Góðu foreldur at børnum í Sankta Frans skúla

Framhaldsdeildin nærkast – men stóra ivamálið er nær?

Trivnaðarnevndin í Tórshavnar kommunu hevur á fundi hósdagin samtykt at arbeiða fram ímóti at skipa eina framhaldsdeild í Sankta Frans skúla. Meðan vit í skúlastýrinum fegnast um hesa avgerð, eru vit als ikki nøgd við, at eingin tíðarfesting er sett á, nær framhaldsdeildin gerst veruleiki. Vit eru ei nøgd við, at fram til tá skulu næmingarnir úr Sankta Frans skúla ganga í framhaldsdeild í Eysturskúlanum. Teir skulu tískil ikki longur ganga í skúlanum á Fløtum, sum annars hevur verið ein sterk siðvenja, ið fevnir um nógv áratíggju. Hetta hevur einki við støðuna við hvørjum einstøkum skúla í Tórshavnar kommunu at gera, men hvussu Tórshavnar kommunu fer við okkara børnum.

Upprunaliga varð skúlin á Fløtum bygdur til at húsa næmingunum í Venjingarskúlanum, Kommunuskúlanum og Sankta Frans skúla, men nú vísir tað seg kortini, at okkara næmingar verða trokaðir út.

Seinastu mánaðirnar hevur Tórshavnar kommunu arbeitt við einum boði upp á ein nýggjan skúlabygnað fyri Havnina. Ein høvuðsorsøk er tann, at tað ikki longur er pláss fyri næmingunum úr Sankta Frans skúla úti í Skúlanum á Fløtum, millum annað tí, at ítróttarrásirnar fylla meira og meira, og at skúlaleiðslan nú ynskir betri umstøður til serflokkar.

Tilmælið hjá umboðnum hjá Sankta Frans skúla í arbeiðsbólkinum var, at um tað ikki bar til hjá okkara næmingum at halda fram úti á skúlanum á Fløtum, átti kommunan at seta eina framhaldsdeild á stovn í Sankta Frans skúla.

Trivnaðarnevndin sigur nú, at hølistrupulleikarnir eru størsta avbjóðingin fyri eini framhaldsdeild í Sankta Frans skúla. Tí ber ikki til at seta framhaldsdeildina á stovn beinanvegin. Alt bendir á, at tað er orsøkin til, at eingin dagfesting er sett inn í samtyktina, um nær framhaldsdeildin skal vera klár. Hetta er bæði ørkymlandi og óvirðiligt.

Somuleiðis ger hetta, at vit í skúlastýrinum nú óttast, at hetta verður ein undanførsla hvørt ár framyvir, og at samtyktin at senda okkara næmingar í Eysturskúlan tí gerst ein varandi loysn. Og hvør veit, kanska hendan varandi loysnin einans er varandi, inntil Eysturskúlin sjálvur verður fullmannaður við sínum egnu næmingum? Skulu børnini í Sankta Frans skúla tá bara trokast til viks enn einaferð, og flytast í eina aðra framhaldsdeild, kanska í Hoyvík ella í Kollafirði – bara har tað er pláss beint tá – sum hetta málið vísir? Vit standa undrandi yvir viðferðina, ið góði gamli Nonnuskúlin og okkara næmingar fáa frá politikkarunum í Tórshavnar Kommunu.

Nei, nú mugu og skulu okkara børn fáa eina ordiliga og virðiliga viðferð. Tað fáa tey við einari heildarloysn, har tey fáa eitt samanhangandi skúlatilboð frá 0.-9. flokk, eins og hinir stóru skúlarnar hava í Tórshavnar kommunu.

At einki árstal er sett inn í sjálva samtyktina er stak óheppið. Hetta má broytast. Í samtyktini eigur at standa, at framhaldsdeildin í Sankta Frans skúla byrjar við skúlabyrjan 2023.

Sum skilst fer Trivnaðarnevndin nú at kalla inn til eyka býráðsfund, har samtyktin skal endaliga samtykkjast. Vit vilja tí heita á tykkum um at gera tykkara ávirkan galdandi beinanvegin.

Ringið og skrivið til politikkararnar. Hjálpið teimum at skilja, at vit tosa um børn her, ikki bara um tøl á einum excel-arki ella fermetrar í einum skúlabygningi. Tosið serliga við tey, sum sita í meirilutanum í býráðnum, tvs. umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum.

Streingið á tey um at seta eina tíðafreist á, nær framhaldsdeildin skal setast á stovn. Vit í skúlastýrinum mæla til, at august 2023 verður skrivað inn í býráðssamtyktina.

Tey, sum sita í Trivnaðarnevndini eru:

Súna Mørk, forkvinna, tel 215589

Bjørg Dam, tel 211428

Kristianna Winther Poulsen, tel 596062

Jákup Dam, tel 284519

Gunvør Balle, tel 556079

Hinir býráðspolitikkararnir eru:

Heðin Mortensen, tel 211196

Annfinn Brekkstein, tel 215800

Tróndur Sigurðsson, tel 218500

Kári Johansen, tel 226110

Annika Olsen, tel 279407

Birgir Nielsen, tel 514499

Ruth Vang, tel 228231

Elsa Berg, tel 504010

Vinarliga

Foreldraumboðini í skúlastýrinum hjá Sankta Frans